*Vi›merkingar/rættingar:*

## Hvussu skal barni› eita

Ja, hvussu skal ta› eita, kært barn har mange navne. Seinastu fer›irnar KT-horni› hevur veri› í Sosialinum, hava vit havt heldur ilt vi› at avgera, hvussu Interneti› skal eita á føroyskum. Sama skili› hevur væl veri› a›rasta›ni hjá fjølmi›lunum, har onkur n‡tir or›i› Alnótin og onnur Alneti›. Sigast skal, at frá Fró›skaparsetur Føroya hava vit nú fingi› vi›mælt at n‡ta or›i› Alnet, so hetta ver›ur n‡tt í framtí›ini.

## K.T.Depilin

Tá vit ummæltu heimasí›una hjá K.T. Deplinum, var millum anna› sagt, at sí›uni tørva›i eina kjaksí›u, har tey ungu kundu koma vi› sínum egnu meiningum um ymiskt.

Hetta er ikki rætt, tí ta› finnst nevnliga ein kjakpartur á sí›uni, i› ein kann n‡ta um ein er skrásettur n‡tari hjá deplinum.

Vit bi›ja K.T.Depilin um at halda okkum tilgó›ar hesum vi›víkjandi.

### Or›alisti

**Or› i› ver›a n‡tt í K.T.Horninum**

| | |
|---|---|
| Alnet | Internet |
| Datagrunnur | Database |
| Fílaflutningur/fílaveiting | Filoverførsel |
| Forrit | Program |
| Heimsta›ur/heimaøki | Domæne |
| Ímynd | Ikon |
| Kervi | Netværk |
| Kjaksí›ur | Diskussionsgrupper |
| Leitibúna›ur | Browser |
| Leitimaskina/Netleitari | Søgemaskine |
| Ravtøkni | Elektronikkur |
| Ritbúna›ur | Software |
| Talgildismyndatól | Digitalt kamera |
| Telduprent forrit | Desktop Publishing |
| Tí›indasí›ur | Nyhedsgrupper |
| Tólbúna›ur | Hardware |

### Topp-10 listin

**Mest vitja›u føroysku heimasí›urnar**

| Hesa vikuna | Sí›stu viku | Vikur á listanum | Sí›unavn |
|---|---|---|---|
| 1 | 1 | 6 | #Faroese_Chat |
| 2 | 4 | 12 | Dimmalætting |
| 3 | 2 | 12 | Tí›indabla›i› Sosialurin |
| 4 | n‡ggj | 0 | B68 ( óalmenn sí›a ) |
| 5 | 5 | 5 | Magnus Sørensen |
| 6 | n‡ggj | 0 | Føroya Javna›arflokkur |
| 7 | n‡ggj | 0 | Føroyskur Fótbóltur |
| 8 | 6 | 5 | Leitel Tí›indi |
| 9 | 8 | 5 | NSÍ |
| 10 | n‡ggj | 0 | Skidlortur´s Web |

*Kelda: www.leitel.fo*

**Eitt sindur um Top 10**

Top 10 listin ver›ur gjørdur av tí frálíku heimasí›uni www.leitel.fo. Leitel.fo er ein sokalla› leitisí›a, har tú kann leita eftir ávísari heimasí›u, sum er skrásett hjá Leitel.fo. Ein og hvør heimasí›a kann skrásetast á Leitel.fo. Eitt krav fyri at koma vi› á Top 10 listan er at tey vitjandi hava vitja› á www.leitel.fo fyrst og harfrá fara á vitjan á a›ra heimasí›u. Ta› vil siga at tær sí›ur sum eru skrásettar á Leitel.fo hava størst møguleika at koma á listan.

## Káta Horni›

Vi› hesufer› eru nakrir væl valdir setningar (ella mangulin uppá ta› sama) frá nøkrum kendum monnum.

**Eg meti, at tørvur ver›ur á umlei› fimm teldum á heimsmarkna›inum.**
*Thomas Watson, nevndarforma›ur hjá IBM, 1943.*

**Handan 'telefonin' hevur alt ov nógvar 'dimsar', til at fólk fara at n‡ta hana til samskifti. Tóli› er ov trupult, og kemur ikki at vera brúkt.**
*Western Union, innanh‡sis bo›, 1976.*

**Hvør í ver›ini ynskir at hoyra filmssjónleikarar tosa?**
*H.M.Warner, Warner Brothers, 1927*

**640K átti at veri› yvaleyst fyri ein og hvønn.**
*Bill Gates, 1981*

*Tema: Teldukeyp:*

## 1. partur - Hvat kann teldan brúkast til?

**Ram, megahertz og gigabyte! Pentium, grafikkort, multimedia og modem!! Menningin gongur vi› rúkandi fer› innan telduøki›, og ta› eru nógv teknisk hugtøk at taka stø›u til hjá teimum sum skulu keypa eina teldu — ikki bara hjá teimum sum keypa fyrstu fer›, men eisini fyri tey, sum ætla at skifta til n‡ggjari og meir framkomna teldu.**

**KT-horni› fer› í komandi blø›um at l‡sa tey mest vanligu hugtøkini i telduver›ini. Lesarin kann fylgja vi› og fáa eina l‡sing av allari útger› til teldur, og um teir mongu møguleikarnar sum eru í telduni. Hetta skuldi givi› lesarum okkara betri førleika at taka stø›u til teir mongu uppl‡singar sum telduhandilin gevur, tá n‡ggj telda skal keypast.**

At keypa eina teldu er ein stór íløga, og man skal trey›ugt angra sítt teldukeyp. Tí skal man, á›renn teldan ver›ur keypt, seta seg ni›ur og neyvt meta um hvat teldan fer at ver›a brúkt til.

Tá or›i› telda ver›ur sagt, ver›ur ofta bert hugsa› um maskinuna, ta› vil siga tólbúna›in. Men ta› er umrá›andi at vita at teldan krevur nøkur forrit, ta› vil siga ritbúna›ur, fyri at vit yvirhøvur kunnu brúka telduna. Tí er ney›ugt bæ›i at keypa sjálva telduna og ritbúna - í minsta lagi eitt st‡riforrit og til dømis eitt tekstvi›ger›arforrit. So hvørt man finnur út av n‡ggjum háttum at brúka telduna skulu fleiri forrit keypast. Hetta fara vit at vi›gera í einum seinni bla›.

Kanska hugsar tú um at brúka telduna til at skriva brøv, greinar, skúlauppgávir, sangir ella okkurt líknandi. Men ta› er ein ke›ilig avmarking at seta sær. Ein telda kann nevnliga nógv, nógv meira enn ta›. So á›renn tú byrjar at hugsa um hvat tú kundi hugsa tær at brúkt telduna til, kunnu vit saman hyggja at hvat hon í veruleikanum kann brúkast til.

**Tekstvi›ger›.** Vi› einum tekstvi›ger›arforriti kann tú brúka telduna til at skriva tekstir, og ta› eru nógvir stórir fyrimunir í mun til at skriva á vanliga skrivimaskinu. Ta› er ikki ney›ugt at skriva kladdu fyrst fyri sí›an at reinskriva. Pappír skal ikki brúkast fyrr enn teksturin er li›ugt skriva›ur. Teldan kann hjálpa til vi› bæ›i at rætta stavifeilir (eisini á fremmandum málum) og málfrø›iligar feilir. Hon kann eisini hjálpa til vi› málsliga stílinum. Á telduni kann tú fáa tekstin at síggja út júst sum tú hevur hug til. Tú kann broyta skriftslag og skriftstødd, seta tekstin upp í teigar, gera talvur og seta inn tekningar, grafikk, strikumyndir og stabbamyndir.

**Rokniark.** Ein telda vi› einum rokniarki er ein gó› hjálp, um tú vil arbei›a vi› tølum. Tú kann til dømis gera tína persónligu fíggjarætlan, rokna skattin og seta upp roknskapir. Tá er ikki ney›ugt at brúka roknimaskinu, pappír og blíant, og tú kann goyma alt í telduni í sta›in fyri roknskaparbøkur og leys pappír.



**Datagrunnur.** Teldan kann brúkast til at goyma allar hugsanda uppl‡singar í. Tú kann gera adressulistar, telefonlistar og stovna skráir yvir títt frímerkjasavn ella bókasavn og tú kann skráseta hvat liggur goymt á tínum sjónbondum. Hetta kann alt gerast vi› einum datagrunnsforriti antin eitt standard datagrunnur (td Access), sum kann tillagast eftir tørvi, ella ein serligan datagrunn sum júst er gjørdur til endamáli›.

**Myndavi›ger›.** Vi› einum skannara ella einum talgildismyndatóli eru møguleikar at leggja myndir inn á telduna og vi›ger›a tær. Vi › einum litprentara (sum í dag eru rættuliga bíligir) kann man prenta vi›gjørdu myndirnar út á pappír í somu gó›sku sum vanligar framkalla›ar myndir. Vi›ger› av myndum krevur at vit hava serlig forrit til endamáli. Tey bestu av hesum forritum eru d‡r.

**Forriting.** Um ta› ikki eydnast at finna eitt forrit sum líkur tíni ávísu krøv, kann man sjálvur gera síni forrit. Ta› er so lætt at gera smá forrit í Windows, at tey flestu eru før fyri at forrita eftir at tey hava arbeitt eina tí› vi› telduni.

**Prenttilger›.** Vi› einum Telduprent forriti (Desktop Publishing) eru møguleikar at prenttilgera t.d. eitt limabla› á telduni. Man skrivar tekstin í einum vanligum tekstvi›ger›ar forriti, setur myndir vi› meira inn í tekstin og tilger› alt tilfar í einum Telduprentforriti. Eftir ta› kann bla›i› prentast út og kopierast. Hetta kann eisini gerast í teimum stóru tekstvi›ger›arforritunum sum t.d. Word, men Telduprentforritini hava betri ambo› til at gera uppsetingina vi›.

sid@sosialurin.fo
kelda: www.fs.dk

## Prískanning: Teldukoyrikort

Hesafer› hava vit valt at kanna hvat ta› kostar at fáa sær teldukoyrikort. Teldukoyrikorti er eitt prógv sum er gó›kent í nógvum londum. Ta› er eitt evropeiskt felag í nevnist ECDL, sum setur krøvini til sjálvar royndirnar til teldukoyrikorti›.

Ta› er ikki ein treyt at man fer á skei› fyri at fáa teldukoyrikort. Ta› ber til at vera sjálvlesandi og bert fara upp til roynd.

Sambært heimasí›uni hjá Dansk Dataforening eru ta› 5 gó›kend virkir og skúlar í Føroyum, har næmingar kunnu taka teldukoyrikortroyndirnar. Tey eru Formula.fo, Handilsskúlin, Tekniski Skúlin í Klaksvík, VIT og Maskinskúlin í Havn. Men skúlin hjá Farodane er eisini blivin gó›kendur.

Sambært heimasí›uni hjá hesum gó›kendu virkjum og skúlum er prísurin fyri at taka skei› og roynd sum ni›anfyri. Sum vit síggja so er bíligast at taka skei› og roynd á Tekniska Skúla í Klaksvík, me›an ta› er d‡rast hjá Formula.fo og Farodane í Havn.

Umrokna vit samla›a prísin til hvønn undirvísingartíma vísir ta› seg eisini at ver›a bíligast at taka teldukoyrikort í Klaksvík, me›an ta› er nógv d‡rast hjá Formula.fo.

Til seinast kunnu vit nevna at ta› sambært heimasí›uni hjá Dansk Dataforening bert eru 2 gó›kendir skúlar har man kann taka roynd til ta› stóra teldukoyrikorti›. Teir eru Tekniski Skúli í Klaksvík og Handilsskúlin í Havn.

sid@sosialurin.fo

| Undirvísingarsta› | Samla›ur prísur Írokna› roynd | Umroynd | Skei›tímar tilsamans | Prísur pr tíma |
|---|---|---|---|---|
| Farodane (Kvasir) | 13.450,00 | 150,00 | 92 | 146,20 |
| Formula.fo | 13.450,00 | 150,00 | 76 | 176,97 |
| Handilsskúlin | 12.450,00 | 150,00 | 92 | 135,33 |
| Tekniski Skúlin Klaksvik | 11.300,00 | | 92 | 122,83 |
| VIT sp/f | 11.900,00 | 325,00 | 88 | 135,23 |

***Prísir á teldukoyrikorti.*** *Allar uppl‡singar eru heinta›ar á Internetinum. Vi› í prísinum allasta›ni er, umframt sjálva undirvísingina, frálærutilfar, ábit og kaffi.*



# við Ljósá

…økur senda lutir úr jarni og rustfríum stáli til viðgerðar við Ljósá.

Mynd: Jens Kristian Vang

sein- tiliga ahald it eitt standi sigur eggur dent á, at yvirskotið er vaksandi, men at hann heldur vil rinda partafelagsskatt enn gera stórar íløgur.

– 20.000 krónur í skatti av hvørjum 100.000 rindi eg av góðum huga, sigur hann

**»Vit valdu rætt«**
Heðin Poulsen hevur ein sera einfaldan starvsfólkapolitikk.

– Tað ræður um at halda upp á fólkið. Og mín hugsan er, at sum stjóri eigur tú at fara við fólkinum, sum tú sjálvur kundi hugsa tær at verið viðfarin, sigur Heðin Poulsen.

Fimm fólk eru í starvi á sandblásingarvirkinum. Umframt stjóran, eru tríggir í beinleiðis framleiðslu, meðan ein kona arbeiðir á skrivstovuni.

Ungi stjórin hevur verið sjálvstøðugur vinnulívsmaður helvtina av lívinum. Ta 500 m² stóru høllina við Ljósá lat hann byggja í 1987, og nú, trettan ár seinni, heldur hann seg hava eina sera haldgóða fyritøku.

– Vit valdu rætt, tá ið vit søgdu: Lat hinar, sum hava skil fyri tí, gera smiðjuarbeiði og arbeiða upp á bilar; vit fara at menna okkum innan fyri blásing, sigur hann.

## Sandblásing

**Her í sandblásingarklivanum verður megin-parturin av arbeiðinum gjørdur. Menninir við slanguni eru frá vinstru: Niels Pauli Hammer, Ragnar Mortensen, Sigurður Eiriksson og Heðin Poulsen.**
**Mynd: Jens Kristian Vang**

Til ber at blása allar jarnlutir fullkomuliga reinar og rustleysar. Eru lutirnir ov stórir at verða fluttir til Ljósáar, ber til at fara á staðið við kompressara og amboðum at blása.

Vanligt er, at lutirnir verða fluttir til Ljósáar og settir í sandblásingarklivan. Uttanfyri stendur hjartað í virkinum; ein 20 M³ Atlas Copco kompressari, sum rekur blásingarskipanina.

**Rustur loysnar**
Sandblásingin er skipað soleiðis, at slangur ganga inn í klivan, og á slanguendanum er ein dýsa, har trýstið er eini 8 bar. Tá ið dýsan verður opnað, stendur sprænurin av smáum stálperlum úr henni. Við hesum verður jarnluturin sprændur. Rustur og annað loysnar, og jarnið stendur eftir, púra reint.

**Sjálvvirkandi sóping**
Í gólvinum í klivanum er ein serlig uppsavningarskipan. Meðan blást verður, verður gólvið sópa av sær sjálvum. Stálsandurin verður sópaður niður í eina sloku, og haðani verður hann sogin upp í eina reinsiskipan. Síðani verður sandurin endurnýttur alt fyri eitt.

**Sink-spræning**
Eftir sandblásing er vanligt, at lutirnir verða metalklæddir. Hetta verður gjørt í øðrum kliva og við aðrari slanguskipan. Maðurin stendur við eini pistól, har tveir træðrir úr sinki renna út ígjøgnum. Streymur er á, og tá ið træðrirnir koma saman, verða teir bræddir, og av tí at lufttrýst er í pistólini, verður bræddað sinkið sprænt upp á lutin. Sinkspræningin verjir væl móti rusti.

## Glasblásing

**Í tí fínara glasblásingarklivanum. Hóast tað ikki hevur so stóran ítøkiligan týdning at blása rustfrítt stál, velja fyritøkur kortini at snøgga sær um stálið her inni.**
**Mynd: Jens Kristian Vang**

Bert rustfrítt stál verður glasblást. Viðgerðin er at kalla hin sama, sum tá ið sandblást verður. Men í hesum føri verður blást við evarska smáum glasperlum. Orsøkin til, at teir ikki nýta stálperlur, er, at tær rusta. Festa tær seg upp á tað rustfría stálið, hevði tað annars rustfría verið rustlitt eftir fáum døgum.

**Stálið skiftir lit**
Trýstið í glasblásingar dýsuni er ikki meira enn eini 3 bar, men úrslitið er sera gott. Rustfrítt stál er vanliga blankt og glinsandi. Tískil síggjast skøvur sera væl á tí. Men tá ið tað er glasblást, verður tað javnt grátt á liti, og tað glitrar nærum ikki longur. Sveisingar, ið síggjast væl á rustfríum stáli; oftast bláligar á liti; fáa fullkomuliga sama lit sum tilfarið sjálvt.

**Mest fyri eygað**
Tvær høvuðsorsøkir eru til, at rustfrítt stál verður glasblást. Onnur er, at soleiðis slepst undan at reinsa sveisingarnar við sera sterkari og vandamiklari sýru. Hin er, at keyparin vil hava, at tað rustfría stálið er so vakurt á at líta sum gjørligt!